LÝSINGARTORGIÐ

Akfør

Grava og planera
Grava planera, urtagard v.m. Tlf 224910 Toyota Avensis og Toyota Camry til sølu. Tlf 224910
224910

Arbeiði

Uttandura málaraarbeiði verður gjørt
Ring 517704 Herman Dam

B.H.C smíð Timbur og snikkaratænasta
Treingja hús tykkara til ábøtur? Vit átaka okkum alt timburarbeiði, vit garantera dygdarsmíð, skjótt og til ein rímiligan kostnað. Royn okkum! B.H.C smíð
tlf. 218991

Bingo

Gott Bingo hjá EB-Streymi
Gott bingo verður við Margáir mánakvøldið 24. apríl2017 kl. 19. Øll hjartaliga vælkomin. EB-Streymur


Býli í Føroyum

Kamar centralt í Havn til leigu
Kamar til friðarligan mann til leigu frá 1. juni fyri 2600 kr. 1 mð. depositum. 4 mans deila annars køk, stovu, vaskimaskin v.m.

Húsarhaldstól

LEIGA HVÍTVØRUR VIÐ KEYPSRÆTTI
VASKIMASKINUR,TURKITRUMLUR,UPPVASKIMASKINUR,KOMFÝRAR OG VASKI/TURKIMASKINUR .EINKI DEPOSITUM ÓKEYPIS ÚTKOYRING UM ALT LANDIÐ SÍ MEGNA.FO
Megna v/ Guttorm Mortensen tkf 251160

VILT TÚ GEVA BLÓÐ?



Ein posi av blóði kann bjarga upp til trimum mannalíum



Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara



Andrea Niclassen
Tórshavn
f. 10-10-1938 d. 10-03-2017

andaðist og varð jarðað.

Ein stór tøkk til starvsfólkið á B6 og til tykkum mongu, sum bakaðu til ervið.

Takk fyri kransar, blómur og peningagávur til Krabbameinsfelagið. Og takk til tykkum øll, sum fylgdu mammu okkara til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna,
Jón, Aleks og Eyðbjørg

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma



Sofía Maria Olsen
f. 08-07-19 d. 22-01-17

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tey, sum bakaðu og hjálptu við ervinum.
Tøkk til prest fyri troystarrík orð og tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar. Vit takka fyri peningagávu til Eysturoyar ellis- og røktarheim
Eisini vilja vit takka starvsfólkinum á ellis- og røktarheiminum fyri at tit vóru so góð við hana.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
Sverri, Eyðna, Anfinn og Súsanna

Tøkk

Orð okkara røkka ikki til at lýsa takksemi fyri sýnda samkenslu, tá mín elskaða kona og kærasta mamma, vermamma, omma, veromma og langomma okkara



Gunnbjørg Rubeksen

doyði og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til Ólav Rasmussen, prest, fyri eina framúr vakra talu og ógloymandi jarðarferð.

Guð signi tykkum øll.

Hendrik, Lisa og Hanna við familjum

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi, langabbi og bróðir okkara



Fróði Sóloy
f. 6. mars 1936 d. 13. september 2016

andaðist og varð jarðaður.

Vit takka Kára Lindberg og Poul Færø fyri troystarrík orð í kapellinum og í Betesda, og Jógvani Mortensen fyri orgulfylgispælið. Eisini tøkk til tykkum, Petur í Gong og Alexander Samuelsen, fyri tykkara lut. Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til í sambandi við jarðarferðina og ervið. Ein serlig tøkk til Samkomuna í Betesda. Tøkk fyri kransar, gávur til Betesda, heilsanir og køkur til ervið.

Takk øll tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna
Ella,
Regina, Kristbjørg, Eyðfinn og Hervør